Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um koronukoppseting til sjúklingar í uttanlandsviðgerð, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu er ætlanin tryggja, at tey, sum eru stødd uttanlands í sjúkuviðgerð og teirra fylgjarar, verða koppsett? og nær kann roknast við, at hetta verður gjørt ?
2. Verða starvsfólkini á sjúklingahotellinum í Keypmannahavn eisini boðin koppsetingina samstundis ?

Viðmerkingar:

Tað verða støðugt sendir sjúklingar til sjúkuviðgerð uttanlands. Størsti parturin á Ríkissjúkrahúsinum. Fleiri av sjúklingunum eru ein part av tíðini á sjúklingahotellinum, og fleiri teirra hava avvarðandi við. Tað eru eisini fleiri, sum ferðast tíðum millum londini í sambandi við langa viðgerðir.

Smittutrýstið er høgt í Danmark, og økta ferðingin saman við ymisku sjúkrasøgunum ger hetta til ein sera viðbreknan bólk. Tí hesir spurningar til landsstýrismannin, so greiða fæst á málinum.

Á Løgtingi, 8. januar 2021

Sirið Stenberg